SEV




# Norðurlendskur umhvørvisvinnari 2015

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
541 705

Framleiðslurokngskapur – Nes 2015

**Ársfrágreiðing og Ársroknskapur 2015**
Ársaðalfundur 29. apríl 2016
Myndir: Fotostudio/Finnur Justinussen, Alan Brockie, Ólavur Frederiksen, Regin Joensen, Kári Durhuus,
Jákup Suni Lauritsen, Johannes Jansson, Magnus Froderberg, Torbjørn Jacobsen og SEV
Forsíðumynd: Norðurlendska umhvørvisvirðislønin 2015

Umbróting, prent og liðuggerð: Føroyaprent

# Framleiðslu-
# roknskapur 2015

Vindmyllur á Vørðuni og
á Eystnesi í Neshaga

# Innihaldsyvirlit


Upplýsingar um felagið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 4
Leiðsluátekning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 5
Høvuðs- og lyklatøl. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
Leiðslufrágreiðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8
Nýttur roknskaparháttur. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember . . . . . . . . . 12
Fíggjarstøða 31. desember . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
Notur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14

# Elfelagið SEV Framleiðsluroknskapur Neshagi fyri 2015

## Innihald

Upplýsingar um felagið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 4
Leiðsluátekning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 5
Átekning frá óheftum grannskoðara . . . . . . . . . . . . . . . . . 6
Høvuðs- og lyklatøl. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
Leiðslufrágreiðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8
Nýttur roknskaparháttur. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember . . . . . . . . . 12
Fíggjarstøða 31. desember . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13

## Felagið

Elfelagið SEV
Fyrisiting:
Landavegur 92
Postboks 319
FO-110 Tórshavn
Telefon: 346800
Heimasíða: www.sev.fo
Teldupostur: sev@sev.fo
Heimstaður: Tórshavn
Roknskaparár: 01.01-31.12
V-tal: 331538

## Nevnd

Jákup Suni Lauritsen, formaður (COB)
Bogi Andreasen, næstformaður
Karl A. Olsen
Karl M. Rasmussen
Steinbjørn O. Jacobsen
Bødvar Hjartvarsson
Frits Poulsen

## Leiðsla

Hákun Djurhuus, stjóri (CEO)
Bogi Bendtsen, deildarstjóri fyri fyrisiting (CFO)
Finn Jakobsen, deildarstjóri fyri net (CTO)
Anders Nedergaard-Hansen, deildarstjóri fyri framleiðslu (COO)

## Grannskoðan

P/F Januar
Løggilt grannskoðanarvirki
Hoyvíksvegur 5, Postboks 30, FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 47 00 Telefaks: 35 17 01
Teldupostur: januar@januar.fo
Heimasíða: www.januar.fo

## Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram framleiðsluroknskapin fyri roknskaparárið 1. januar 2015 - 31. desember 2015 hjá elfelagnum SEV viðvíkjandi vindmyllulundini á Vørðuni/Neshaga. Framleiðsluroknskapurin er eisini ein partur av ársfrásøgnini hjá elfelagnum SEV.

Framleiðsluroknskapurin er gjørdur í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at framleiðsluroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2015 og av úrslitinum av framleiðsluvirkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar 2015 - 31. desember 2015.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 8. apríl 2016

### Stjórn

*Hákun Djurhuus*
*Stjóri*

### Fíggjarleiðsla

*Bogi Bendtsen*
*Deildarstjóri fyri fyrisiting*

### Nevnd

*Jákup Suni Lauritsen*
*Formaður*

*Bogi Andreasen*
*Næstformaður*

*Karl A. Olsen*

*Karl M. Rasmussen*

*Steinbjørn O. Jacobsen*

*Bødvar Hjartvarsson*

*Frits Poulsen*

# Átekning frá óheftum grannskoðara

Framleiðsluroknskapurin er gjørdur sum eitt ískoyti og útgreining til ársfrásøgnina hjá elfelagnum SEV. Grannskoðanin av ársroknskapinum hjá elfelagnum SEV er endað, og roknskapurin hevur fingið eina átekning uttan fyrivarni ella supplerandi upplýsingar. Víst verður til síðu 52 í ársfrásøgnini hjá elfelagnum SEV, har tann samlaða átekningin framgongur.

Tórshavn, tann 8. apríl 2016

**P/F Januar**
Løggilt grannskoðanarvirki

*Hans Laksá*
*Statsaut. revisor*

# Høvuðs- og lyklatøl

| Upphæddir í tkr. | 2015 | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | t. kr. | t. kr. | t. kr. |
| Nettosøla | 6.551 | *6.057* | *10.657* |
| Úrslit áðrenn av og niðurskrivingar | 5.105 | *5.328* | *8.493* |
| Rakstrarúrslit | -436 | *2.302* | *1.715* |
| Fíggjarligir postar, netto | -728 | *-891* | *-588* |
| **Ársúrslit** | **-1.164** | ***1.411*** | ***1.127*** |
| | | | |
| **Fíggjarstøða** | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 37.564 | *43.105* | *45.883* |
| **Eginogn** | **1.374** | ***2.538*** | ***1.127*** |

# Leiðslufrágreiðing

## Høvuðsvirksemið

SEV hevur gjørt sjálvstøðugan roknskap fyri vindmyllulundina í Neshaga eftir kravi frá Jarðfeingi í sambandi við innlatan av tilboðum um framleiðslu av el úr vindi, sum SEV lat myndugleikanum í 2010. Roknskapurin er ein partur av framleiðsluroknskapinum, sum aftur er ein partur av samtaksroknskapinum hjá SEV. Fyri nærri sundurgreiningar av hesum verður víst til samtaksroknskapin og framleiðsluroknskapin, sum er at finna á www.sev.fo.

Frá 2016 at rokna verður vindmyllulundin løgd í eitt sjálvstøðugt partafelag, sum SEV fer at eiga einsamalt. Samlaða íløgan í vindmyllulundina í 2012 er uppgjørd til 49,1 mió. kr., og er sjálvstøðugur byggiroknskapur gjørdur í hesum sambandi, hesin er at finna á www.sev.fo. Byggiroknskapurin vísir ein samlaðan byggikostnað á 50,0 mió. kr. Munurin á 0,9 mió. kr. millum byggiroknskapin og útveganarvirðið í hesum roknskapi er renta í byggitíðini, sum ikki er ognarførd men útreiðsluførd hjá samtakinum. Í inniverandi roknskapi er íløgan fíggjað við skuld til peningastovnar og millumrokning við samtakið. Tá dótturfelagið tekur yvir ognir og skyldur í sambandi við yvirtøku av vindmyllulundini, verður henda yvirtøka fíggjað við stovnan av langfreistaðari millumrokning við SEV og innskoti av partapeningi frá SEV. Harumframt hevur dótturfelagið eina millumrokning við SEV í sambandi við dagliga raksturin.

2013 er fyrsta heila rakstrarárið hjá vindmyllulundini í Neshaga. Í uppgerðini fyri nettosøluna er innroknað elsøla frá 1. november 2012 til 31. desember 2013 ella 14 mánaðir. Hereftir er roknað við inntøku fyri 2014 og 2015.

Vindmyllulundin hevur í 2013 framleitt 15.912 MWt, 14.915 MWt í 2014 og 15.415 MWt í 2015, ella tilsamans 46.242 MWt alt tíðarskeiðið. Roknað er ikki við nakrari trygd fyri keyp av kWt frá netpartinum, men bert við tí framleiðslu, sum vindmyllulundin hevur framleitt. Avroknað verða 40 oyru fyri hvønn kWt, netparturin keypir frá myllunum á Vørðuni og 41 oyru frá myllunum á Eystnesi.

SEV lat inn tilboð at framleiða hvønn kWt fyri 41,0 oyru í 2010 til Jarðfeingi í kapping við tveir aðrar veitarar. SEV vann sum kunnugt útboðið. Inntøkan fyri 2013 til 2015 er uppgjørd við støði í tilboðsprísinum, og er inntøkan fyri sølu av kWt fyri 2015 6,6 mió. kr. og fyri 2014 6,1 mió. kr. Fyri 2013 er sum nevnt talan um 14 mánaðir við inntøku frá elsølu samsvarandi við, at vindmyllulundin alment bleiv tikin í nýtslu í november 2012. Fullar avskrivingar eru tiknar við sum útreiðsla í 2012, hóast elsølan bert er frá november 2012, og hædd er tikin fyri hesum ójavna í 2012. Fyri 2015 er inntøka frá sølu av gomlu Vestasmylluni uppá 0,5 mió. kr. tikin við sum onnur søla.

Kostnaðurin fyri 2015 og 2014 er ávikavist 1,2 mió. kr. og 0,7 mió. kr. Kostnaðurin fyri 2013 er 1,7 mió. kr. Talan er um beinleiðis staðfestan kostnað til tilfar- og tænastuveitingar, eins og vindmyllulundin hevur fingið tillutað sín part av felagskostnaðinum. Vindmyllulundin hevur eina viðlíkahaldsavtalu við vindmylluveitaran, sum rindað verður fyri. Ein tænastusáttmáli eftir sama leisti sum fyri vindmyllulundina í Húsahaga verður væntandi undirskrivaður í næstum.

Starvsfólkalønirnar eru uppgjørdar í 2015 og 2014 til ávikavist 0,2 mió. kr. og 0,1 mió. kr.

Avskrivingar eru gjørdar fyri 3,0 mió. kr. samsvarandi nýtta roknskaparháttinum í 2015, sum er sama støði sum í 2014. Harumframt er niðurskriving gjørd fyri 2,5 mió. kr. í sambandi við sølu av gomlu Vestasmylluni, sum var tikin niður í 2012. Tilsamans er av- og niðurskrivað fyri 5,5 mió. kr. í 2015.

Rentuútreiðslurnar eru uppgjørdar til 0,7 mió. kr.

Úrslitið fyri 2015 er eitt hall uppá 1,2 mió. kr. móti einum yvirskoti uppá 1,4 mió. kr. í 2014. Hallið er íkomið grundað á niðurskriving uppá 2,5 mió. kr. Verður hædd tikin fyri søluni frá og niðurskrivingin av vindmylluni, er úrslitið fyri 2015 eitt yvirskot uppá 0,8 mió. kr.

Væntandi verður úrslitið fyri 2016 væl betur enn fyri 2015.

# Nýttur roknskaparháttur

## ALMENT

Ársroknskapurin fyri Elfelagið SEV er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri stór feløg í flokki C.

Ársroknskapurin er gjørdur eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørdur í donskum krónum. Somuleiðis er roknskaparhátturin tann sami sum í framleiðslupartinum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

Har sum talvur í roknskapinum vísa tøl avrundaði til heilar túsund ella millión krónur, og talvan inniheldur samanburðartøl millum ár víst sum munur í krónum ella prosentum, eru samanburðartølini roknaði uppá undirliggjandi tølini og síðani avrundað. Tískil kann koma fyri, at smærri munir eru millum avrundaðu tølini, sum víst verða í talvuni, og útroknaði samanburðartølini í talvuni.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

### Nettosøla

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og eftir at avsláttur í samband við søluna er frádrigin.

### Vørunýtsla

Vørunýtsla umfatar kostnaðir til keyp av rávørum og hjálpartilfari, frádrigið avsláttur og goymslubroyting í árinum.

### Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata keyp av tilfari og øðrum tænastuveitingum, umframt annan fyrisitingarkostnað.

### Starvsfólkakostnaðir

Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum verða móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

### Av- og niðurskrivingar

Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

### Fíggjarpostar

Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og -kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn, og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

## FÍGGJARSTØÐAN

### Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis er knýtt at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar og restvirðunum hjá ognunum:

| | *Brúkstíð* | *Restvirði* |
|---|---|---|
| Vindmyllur | 15 ár | 0% |
| Rakstrargøgn | 3-5 ár | 0% |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Viðvíkjandi eginframleiddum ognum fevnir útveganarvirðið um kostnaðir av tilfari, lutum, undirveitarum, beinleiðis lønarkostnaði og óbeinleiðis framleiðslukostnaði.

### Niðurskriving av støðisogn

Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending um, hvørt tey eru minkað í virði. Hetta kemur afturat vanligu avskrivingini.

Eru ábendingar um virðisminking, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Endurvinningarvirðið er tað hægra av nettosøluprísinum og kapitalvirðinum. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettoinntøkunum frá nýtsluni av ognunum.

### Vørugoymslur

Vørugoymslur verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFO-háttinum. Um nettorealisatiónsvirðið av vørugoymslunum er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Útveganarvirðið á handilsvørum umframt rávørum og øðrum hjálpartilfari umfatar keypsprís umframt flutningsgjald.

Útveganarvirðið av framleiddum liðugvørum og vørum í gerð umfatar útveganarvirði av rávørum, hjálpartilfari, beinleiðis lønarkostnaðum og óbeinleiðis framleiðslukostnaðum. Óbeinleiðis framleiðslukostnaðir umfata óbeinleiðis tilfar og løn umframt viðlíkahald og avskrivingar av maskinum, virkisbygningum og útgerð, ið verður nýtt í framleiðsluni. Harumframt umfatar posturin kostnaðir til at leiða og fyrisita framleiðsluna, umframt ognarførdan menningarkostnað, ið viðvíkur vøruni.

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

### Partafelagsskattur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum. Skyldugur skattur og skattaáogn verða víst mótroknað í tann mun, at hetta er í samsvari við lógina, og at postarnir væntandi verða avroknaðir netto ella samstundis.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

Broytingar í útsetta skattinum, sum standast av broytingum í skattasatsum, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin.

### Aðrar avsettar skyldur

Avsettar skyldur umfata væntaðar kostnaðir av ábyrgdarskyldum, tap uppá arbeiði í gerð, umskipanir v.m. Avsettar skyldur verða innroknaðar, tá felagið hevur eina rættarliga ella ítøkiliga skyldu orsakað av einari hending, sum hevur verið, og tað er sannlíkt, at skyldan verður avgreidd við at brúkt verður av fíggjarligu ognunum hjá felagnum.

Avsettar skyldur verða virðisásettar til nettorealisatiónsvirði ella til dagsvirði, tá tað er væntandi, at skyldan skal avgreiðast í fjarari framtíð.

## Skuld

Í sambandi við lántøku verður fíggjarlig skuld innroknað til útveganarvirðið, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið, verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Skuld til realkredittstovnar og peningastovnar verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til restskuldina, tá talan er um kontantlán. Viðvíkjandi lánsbrævalánum verður amortiserað útveganarvirði roknað sum kontantvirði á lánsupptøkudegnum, javnað við gjørdum avskrivingum í avdráttartíðarskeiðnum av kursjavningini av láninum á upptøkudegnum.

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Lyklatøl

Lyklatøl eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings „Anbefalinger & Nøgletal 2010“.

Høvuðs- og lyklatølini í yvirlitinum eru roknað soleiðis:

Renting av eginogn $= \frac{\text{Úrslit}}{\text{Miðal eginogn x 100}}$

Ognarumferð $= \frac{\text{Nettoumsetningur}}{\text{Aktiv tilsamans}}$

Eginognarpartur $= \frac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Aktiv tilsamans}}$

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| | Nota | 2015<br>DKK | *2014<br>t. DKK* | *2013[1]<br>t. DKK* |
|---|---|---|---|---|
| ***Nettosøla*** | 1 | **6.551.033** | ***6.057*** | ***10.657*** |
| *Tilfar og tænastuveitingar* | 2 | -1.240.434 | *-650* | *-1.707* |
| **Bruttovinningur** | | **5.310.599** | ***5.328*** | ***8.949*** |
| *Starvsfólkaútreiðslur* | 3 | -205.307 | *-79* | *-457* |
| *Av- og niðurskriving av materiellari støðisogn* | | -5.540.900 | *-3.025* | *-6.778* |
| **Rakstrarúrslit** | | **-435.608** | ***2.302*** | ***1.715*** |
| *Aðrir fíggjarligir kostnaðir* | 4 | -727.890 | *-891* | *-588* |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **-1.163.499** | ***1.411*** | ***1.127*** |
| *Skattur av ársúrsliti* | 5 | 0 | *0* | *0* |
| **Ársúrslit** | | **-1.163.499** | ***1.411*** | ***1.127*** |
| **Uppskot til býti av úrsliti:** | | | | |
| Flutt úrslit | | -1.163.499 | *1.411* | *0* |
| **Býti tilsamans** | | **1.374.138** | ***2.538*** | ***1.127*** |

1) Vindmyllurnar vórðu settar í rakstur í november 2012, og tí er roknskapartíðarskeiðið fyri 2013 14 mánaðir frá 1. november 2012 til og við 31. desember 2013.
Hóast framleitt bert var í 2 mánaðir av 2012, eru fullar avskrivingar av støðisognini tiknar við sum útreiðsla fyri árið 2012.

# Fíggjarstøða 31. desember

| OGN | Nota | 31.12.15 DKK | *31.12.14 t.DKK* | *31.12.13 t.DKK* |
|---|---|---|---|---|
| Framleiðsluvirkir | 6 | 37.098.772 | *40.124* | *43.140* |
| Bygningar og jarðarøkir | 6 | 0 | *0* | |
| Rakstrargøgn | 6 | 0 | *0* | |
| Íløguarbeiði í gerð | 6 | 465.641 | *2.981* | *2.743* |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | | **37.564.413** | ***43.105*** | ***45.883*** |
| **Støðisogn tilsamans** | | **37.564.413** | ***43.105*** | ***45.883*** |
| Vørugoymsla | | 0 | *0* | *0* |
| **Vørugoymslur tilsamans** | | **0** | ***0*** | ***0*** |
| Onnur áogn | | 0 | *0* | *0* |
| **Áogn tilsamans** | | **0** | ***0*** | ***0*** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **0** | ***0*** | ***0*** |
| **OGN tilsamans** | | **37.564.413** | ***43.105*** | ***45.883*** |

| SKYLDUR | Nota | 31.12.15 DKK | *31.12.14 t. DKK* | *31.12.13 t. DKK* |
|---|---|---|---|---|
| Flutt úrslit | 7 | 1.374.138 | *2.538* | *1.127* |
| **EGINOGN TILSAMANS** | | **1.374.138** | ***2.538*** | ***1.127*** |
| Avsetingar til útsettan skatt | 8 | 0 | *0* | *0* |
| **Avsetingar tilsamans** | | **0** | ***0*** | ***0*** |
| Skuld til peningastovnar | 8 | 22.130.000 | *23.169* | *24.869* |
| **Langfreistað skuld tilsamans** | | **22.130.000** | ***23.169*** | ***24.869*** |
| Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 8 | 0 | *410* | *410* |
| Millumrokning Net | | 14.060.275 | *16.989* | *13.308* |
| Onnur skuld | | 0 | *0* | *6.170* |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans** | | **14.060.275** | ***16.989*** | ***19.478*** |
| **SKULD TILSAMANS** | | **36.190.275** | ***40.568*** | ***44.756*** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | | **37.564.413** | ***43.105*** | ***45.883*** |

| | |
|---|---|
| Maskinyvirlit | 9 |
| Veðsetingar og aðrar skyldur | 10 |

# Notur

| 1. NETTOUMSETNINGUR | 2015 DKK | *2014 DKK* | *2013 DKK* |
|---|---|---|---|
| *Egin framleiðsla* | 6.051.033 | *6.057.002* | *10.656.602* |
| *Netábyrgd* | 0 | *0* | *0* |
| *Onnur søla* | 500.000 | *0* | *0* |
| **Tilsamans** | **6.551.033** | ***6.057.002*** | ***10.656.602*** |

| 2. TILFAR OG TÆNASTUVEITINGAR | 2015 DKK | *2014 DKK* | *2013 DKK* |
|---|---|---|---|
| *Linjur* | 0 | *0* | *205* |
| *Byrging, rør og tunlar* | 0 | *9.695* | *0* |
| *Tangar og umhvørvi* | 0 | *0* | *8.123* |
| *Maskinur* | 665.346 | *375.358* | *284.444* |
| *El og teknikk* | 0 | *5.584* | *49.121* |
| *Bygningar og lendi* | 34.986 | *31.826* | *429.164* |
| *Aðalfundur og nevnd* | 7.356 | *0* | *20.197* |
| *Kanning og ráðgeving* | 213.600 | *1.380* | *246.025* |
| *Kunningartøkni* | 24.211 | *0* | *25.682* |
| *Leiðsla og skrivstovuhald* | 26.275 | *60.000* | *51.386* |
| *Aðrar rakstrarútreiðslur* | 5.608 | *5.514* | *24.516* |
| *Aðrar fyrisitingarútreiðslur* | 263.051 | *161.044* | *568.510* |
| ***Tilsamans*** | **1.240.434** | ***650.400*** | ***1.707.372*** |

| *3. STARVSFÓLKAÚTREIÐSLUR* | 2015 DKK | *2014 DKK* | *2013 DKK* |
|---|---|---|---|
| *Lønir* | 205.307 | *78.245* | *454.174* |
| *Pensjónir* | 0 | *200* | *289* |
| *Almenn gjøld* | 0 | *467* | *2.094* |
| ***Tilsamans*** | **205.307** | ***78.912*** | ***456.557*** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Starvsfólk við høvuðsinntøku frá SEV* | - | - | - |
| *Miðaltal av starvsfólkum* | - | - | - |

## *4. FÍGGJARÚTREIÐSLUR*

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Rentur, lán og bankaskuld v.m.* | 727.890 | *891.385* | *587.875* |
| ***Tilsamans*** | **727.890** | ***891.385*** | ***587.875*** |

## *5. SKATTUR AV ÁRSÚRSLITI*

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Partafelagsskattur* | *0* | *0* | *0* |
| *Javning av útsettum skatti* | *0* | *0* | *0* |
| ***Tilsamans*** | ***0*** | ***0*** | ***0*** |

## *6. MATERIELL STØÐISOGN*

| Upphædd í DKK | Framleiðsluvirki | Bygningar | Rakstrargøgn | Tilsamans | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 49.131.004 | 0 | 0 | 49.131.004 | *57.967.783* |
| Tilgongd í árinum, netto | 2.515.430 | 0 | 0 | 2.515.430 | *0* |
| **Útveganarvirði ultimo** | **51.646.435** | **0** | **0** | **51.646.435** | **57.967.783** |
| Av- og niðurskriving primo | -9.006.763 | 0 | 0 | -9.006.763 | *-14.828.072* |
| Avskrivingar í árinum | -5.540.900 | 0 | 0 | -5.540.900 | *-3.025.470* |
| Av- og niðurskriving ultimo | -14.547.663 | 0 | 0 | -14.547.663 | *-17.853.541* |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **37.098.772** | **0** | **0** | **37.098.772** | ***40.114.242*** |
| Roknskaparligt virði ultimo 2014 | 40.114.242 | 0 | 0 | 40.114.242 | |
| Arbeiði í gerð primo | 2.981.071 | 0 | 0 | 2.981.071 | *2.743.216* |
| Tilgongd til arbeiði í gerð í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 | *247.855* |
| Liðug arbeiði førd til avskrivingar | -2.515.430 | 0 | 0 | -2.515.430 | *0* |
| **Arbeiði í gerð ultimo** | **465.641** | **0** | **0** | **465.641** | ***2.991.071*** |
| Arbeiði í gerð ultimo 2014 | 2.991.071 | 0 | 0 | 2.991.071 | |
| **Støðisogn ultimo** | **37.564.413** | **0** | **0** | **37.564.413** | ***0*** |
| Støðisogn ultimo 2014 | 43.105.313 | 0 | 0 | 43.105.313 | |

## *7. EGINOGN*

| **Upphædd í DKK** | **Flutt úrslit** |
|---|---|
| *Eginognaruppgerð 01.01.14 - 31.12.14* | |
| *Salda pr. 01.01.14* | 1.126.803 |
| *Flutt úrslit* | 1.410.834 |
| *Salda pr. 31.12.14* | 2.537.637 |
| | |
| *Eginognaruppgerð 01.01.15 - 31.12.15* | |
| *Salda pr. 01.01.15* | 2.537.637 |
| *Flutt úrslit* | -1.163.499 |
| *Salda pr. 31.12.15* | 1.374.138 |

## *8. SKULD*

| | *Avdráttur fyrsta árið* **DKK** | *Restskuld eftir 5 ár* **DKK** | *Skuld tilsamans 31.12.15* **DKK** |
|---|---|---|---|
| *Skuld til fíggjarstovnar* | 0 | 11.065.000 | 22.130.000 |
| ***Tilsamans*** | **0** | **11.065.000** | **22.130.000** |

Til upplýsing í notuni er restskuldin eftir 5 ár útroknað sum serialán við restáramáli uppá 10 ár. SEV er við at umleggja langfreistaðu lániskuldina, og eftir umleggingina verður greitt, hvør veruligi avdráttarprofilurin verður.

## *9. MASKINYVIRLIT VIÐ ÁRSLOK 2015*

| ***Stað*** | ***Maskina*** | ***MW*** | ***Maskintypa*** | ***Framleiðari*** | ***Drívevni*** | ***Ár*** | ***Aldur*** | ***Tímar tils.*** | ***Tímar 2015*** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Neshagi* | V1 | 0,9 | Vindmylla (pitch reg.) | Enercon | Vindur | 2012 | 3 | 23.725 | 8.138 |
| *Neshagi* | V2 | 0,9 | Vindmylla (pitch reg.) | Enercon | Vindur | 2012 | 3 | 24.304 | 7.916 |
| *Neshagi* | V3 | 0,9 | Vindmylla (pitch reg.) | Enercon | Vindur | 2012 | 3 | 24.546 | 8.009 |
| *Neshagi* | V4 | 0,9 | Vindmylla (pitch reg.) | Enercon | Vindur | 2012 | 3 | 24.146 | 7.949 |
| *Neshagi* | V5 | 0,9 | Vindmylla (pitch reg.) | Enercon | Vindur | 2012 | 3 | 24.090 | 8.111 |

## *10. VEÐSETINGAR OG AÐRAR SKYLDUR*

Víst verður til ársfrásøgnina hjá Elfelagnum SEV, har veðsetingar, rættarsakir og aðrar møguligar skyldur framganga.

# Elkervið


Motororkuverk
Vatnorkuverk
60kV Koplingarstøð
Vindorka
60kV
20kV
10kV
6kV
Sjókaðal

Elfelagið SEV · Boks 319 · FO-110 Tórshavn · Tlf. +298 34 68 00 · sev@sev.fo · www.sev.fo